07 VESTUR — VÍKINGUR

Kappingarárið 2018

22. juni
kl. 18.30



Leikskrá nr. 8

07 Vestur
Postboks 51
370 Miðvágur

Jim Sonni Guttesen
Formaður jims@jims.fo

John Weihe Næstform.
jwveiting@gmail.com

Nevndarlimir
Jón Nordendal, jon@lbf.fo
Egil Petersen
Jákup Olaf Jóhannesarson
Eggaba Andreasen
Gunleif Magnusarson
Eron Debes

07 Vestur leikskrá
Útgevari: 07 Vestur

Ábyrgd:
Fróði Poulsen

Myndir og greinar.
Jóanis Albert Nielsen
Ingolf S Olsen
Jarnhold Nattestad
Fróði Poulsen








jn.fo

# Vælkomin á Dungasand

*Jarnhold Nattestad*

**Tað krevur sín mann at reisa seg eftir 10 tap í trekk, so vit skulu veruliga til at prógva okkum, nú skálamenn eru á vitjan í 12. umfari í Betri Deildini. Kappingin er sostatt nærum hálvrunnin, og vit eru 9 stig frá niðurflytingar-strikuni.**



Tá besta lið okkara soleiðis er í tungum sjógvi, setur tað eisini okkum øll, sum eru rundan um felagið, í trýst. Hugurin er kanska ikki tann sami at hjálpa til og lættari er at finna sær okkurt annað at taka sær til. Men tað er júst nú, at vit hava brúk fyri hvørjum øðrum.

Tað er eisini hetta, sum vísir lyndi í okkum. Eru vit vinnarar ella bara taparar?

Í 07 Vestur gera vit nógv rætt. Ikki alt - men soleiðis er væl vil øllum. Nógv orka verður løgd í ungdómsarbeiðið, ið alt fleiri feløg eru farin at skeita til. Tveir ungdómsvenjarar uppá fulla tíð, og venjingar fyri børn og ung, áðrenn skúlatíð, í barnagarðstíð og eftir skúla og út á kvøldið. Hjá summum er tilboð heili 7 ferðir um vikuna umframt dystir.

Og vit hava eisini fingið kvinnudeildina upp at standa. Ja, væl so tað, nú tær júst hava lagt seg einsamallar á odda í 2. deild, eftir rættiliga soltin ár hjá kvinnum í Vágum. (Meira um tað inni í blaðnum)

Vit kunnu eisini vinna á Skála í dag. Vit hava víst, í undanfarnum dystum í ár, at vit kunnu spæla upp móti skálamonnum, og eisini leggja teir undir trýst. Við rætta hugburðinum, á og uttan fyri vøllun, á heimavølli á Dungasandi, hava vit møguleikan at byrja kappingarárið av nýggjum og byrja at innheintað tað mista.

Sjálvt í tungum sjógvi, og hóast í mótstreymi og undir trýsti, eru vit vinnarar!

***Kom so 07 Vestur!***

Klædnahandilin
SORELLA
Miðvágur

# VESTMEK
MASKINVERKSTAÐUR & SMIÐJA



**Vestmek** bjóðar góða góðsku
fyri góðan prís





VESTMEK
MASKINVERKSTAÐUR & SMIÐJA

Bryggjan 17 380 Sørvágur Faroe Isands www.vestmek.fo

Grannskoðan // Ráðgeving // Bókhald // Roknskapur

Skalt tú meta
um framtíðina
mást tú
kenna fortíðina

Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

WWW.JANUAR.FO

SENDISTOVAN

**Sand- og skervsølan í Sandavági**

**Alt innan tilfar - veitan og levering**

**Lastvognskoyring v/Erhard Dam ✆ 213577**



Find us on
Facebook
Lastvognskoyring v/ Erhard Dam

Vága Fysioterapi

v/ Klæmint Isaksen Dip.MDT
Hjørleif Niclasen Cert.MDT,MFE

Fyribyrging, diagnosteriserning

Hornavegur 12
370 Miðvágur
Tlf. 332 007

fysioterapi@fysioterapi.fo

# Formaðurin væntar at vit klára at venda gongdini

*Jóanis Albert Nielsen*
Nú er seinasti dystur á skránni undan summarsteðginum í Betri-deildini vit taka móti meistarunum seinastu tvey kappingarárini Víkingi. Víkingur er nummar fimm í Betri-deildini við 23 stigum. Tað er nakað meira enn hvat vit hava, vit hava fingið 4 stig higartil.
Sjálvt um tað ikki hevur gingið væl hjá okkum higartil í ár, so hevur formaðurin hjá okkum Jim Sonni Guttesen góðar vónir til restina av kappingarárinum.
Til dystin í dag væntar hann, at um allir gera ein góðan innsats samstundis sum margnialarnar eru við okkum, so kunnu vit fáa eitt gott úrslit. Margnialarnir hava ikki verið við okkum enn hetta kappingarárið heldur formaðurin.

Flytingargluggin er nú opin, og hetta er seinasti dystur hjá toppskjúttanum hjá okkum Gilla Samuelsen, og eisini hjá Nikola.
Ein miðvallari úr Onglandi kom mánadagin til Føroyar, hann royndarvenur við liðnum í løtuni. Felagið og miðvallarin eru í samráðingum um sáttmála.
Jim Sonni Guttesen sigur at tað er torført at spáa um hvussu tað fer at ganga í seinnu hálvu. Men hann væntar at vit fáa vent keðiligu gongdini. Spælarnir vísa meira og meira fyri hvønn dyst. Bæði spælarnir og nevndin gera alt fyri at við skulu síggja Betri fótbólt í Vágum komandi kappingarár eisini.




BANKNORDIK
Tað er heildin, sum telur
Bílegg fund á
www.banknordik.fo/nordik360
Ráðgeving, sum øll skilja


Arkitektar, verkfrøði, búskaparfrøði & bygging
tlf: 33 33 66 wt@wt.fo www.wt.fo


Óivað besta úrval og ráðgeving innan listvørur í Føroyum!
MYNDLIST
tel. 25 95 05 - Tórsgøta 16 - 100 Tórshavn
finn okkum eisini á facebook.com/myndlistfo

# Pre-Order

**Keyp on-line og slepp undan bíðirøð!**

1. Bilegg og gjald á heimasíðuni
2. Heinta vøruna í handlinum
3. Flúgv út í heim

---

1. Bilegg og gjald á heimasíðuni
2. Flúgv heim til Føroya
3. Heinta vøruna í handlinum

# Klárt til avheintan - einki roks

Tú kanst nú fáa bílagt og goldið tínar tollfríu vørur longu áðrenn tú kemur í Vága Floghavn.

Vel tínar vørur millum okkara mongu góðu tilboð í **dutyfree.fo**, koyr vørurnar í innkeypskurvina og avgreið ordran við tínum gjaldskorti.

Tá ið tú kemur í Vága Floghavn, hava vit pakka tær vøruna og kanst tú fara beinleiðis víðari á tínari ferð.

Einfalt, skjótt og einki roks.

Les meira og bílegg tínar vørur á **www.dutyfree.fo**.



DUTY FREE FAE

P/F Duty Free FAE    Vága Floghavn    380 Sørvágur    Faroe Islands    Tel. 35 44 00


Betri stuðlar breiddini
Bestu deildirnar hjá kvinnum og monnum eita nú Betri deildin.
Vit stuðla eisini ungdóms-arbeiðnum hjá øllum feløgunum og menna breiddina í føroyskum fótbólti.
betri
DEILDIN
G14
betri

# Heildarloysnir frá Articon






ARTICON

Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · www.articon.fo



Sp/f Mykines
Bryggjan 17
FO-380 Sørvágur
Tel. +298 21 08 70
www.mykines.fo

mykines.fo
must see from sea




BÓNUS
stuðlar ítróttinum í nærumhvørvinum
mánadag til leygardag | 9-22


Betong og timburarbeiði
Jóni Durhuus, byggimeistari • FO-350 Vestmanna • Tlf. 424473 – 223124



IDEmøblar

Giljanes bussar koyra um alt landið




Tel. 21 98 99 giljanes@giljanes.fo

VP .fo
Vágaportalurin

Vágafólk lesa Vágaportalin

VP .fo
Vágaportalurin



HÚSFRÍÐKAN

EINGJARTOFTIR 9 • SANDAVÀGUR • TEL 33 33 20








**Alt stoypiarbeiði verður gjørt**

**Erik Heinesen, Bøur**
**Tel: 593602**



Klima





Torkilsvegur 15
360 Sandavágur
+298 333 555
klima@klima.fo

Klima
hevur loysnina til tín, eisini ta grønu

# LEIKARALISTI

## 07 VESTUR

| | Pláss | Aldur | Dystir | Min. |
|---|---|---|---|---|
| Høgni Nielsen | V | 21 | 14 | 1260 |
| Janus Samuelsen | M | 19 | 14 | 1126 |
| Kyrylo Silich | M-Á | 27 | 14 | 1100 |
| Nikola Krcmarevic | M | 26 | 13 | 1084 |
| Gilli Samuelsen | M-Á | 19 | 13 | 1034 |
| Ken Fagerberg | Á | 29 | 13 | 1012 |
| Jóannis á Steig | V | 21 | 12 | 867 |
| Sølvi Egilsson | M | 23 | 11 | 812 |
| Tór-Ingar Akselsen | M-Á | 37 | 11 | 603 |
| Dann Fróðason | M | 18 | 10 | 832 |
| Asbjørn Heðinsson | V-M | 17 | 10 | 650 |
| Ivan Stojkovic | MV | 41 | 9 | 810 |
| Ndende Adama Guéye | M | 35 | 8 | 658 |
| Martin Tausen | M | 28 | 6 | 500 |
| Niels Mouritsen | V | 19 | 6 | 378 |
| Silas Eyðsteinsson | MV | 20 | 5 | 450 |
| Teitur Olsen | M | 19 | 4 | 119 |
| Hørður Egilsson | V | 19 | 4 | 38 |
| Petur Dalbø | V | 27 | 2 | 113 |
| Oskar Weihe | V | 19 | 2 | 23 |
| Martin Dam | M-Á | 18 | 1 | 8 |
| Karl Weihe | M-Á | 18 | 1 | 7 |
| Fríði Joensen | V | 20 | 0 | 0 |

Venjari: Pauli Poulsen
Hjálparvenjari: Tór-Ingar Akselsen

## VÍKINGUR

| | Pláss | Aldur | Dystir | Min. |
|---|---|---|---|---|
| Sølvi Vatnhamar | M | 32 | 14 | 1260 |
| Hanus Jacobsen | V | 33 | 14 | 1260 |
| Dennis Nieblas | V | 27 | 14 | 1253 |
| Adeshina Lawal | Á | 33 | 14 | 1217 |
| Gunnar Vatnhamar | V-M | 23 | 13 | 1161 |
| Adrian Cascaval | M | 31 | 13 | 1125 |
| Heðin Hansen | M | 24 | 13 | 1103 |
| Atli Gregersen | V | 36 | 12 | 1080 |
| Elias Rasmussen | MV | 22 | 11 | 990 |
| Andreas Olsen | Á | 30 | 11 | 650 |
| Filip Djordjevic | M-Á | 24 | 11 | 589 |
| Hans Jørgen Djurhuus | V | 39 | 10 | 784 |
| Hans Jákup Lervig | V-M | 21 | 10 | 586 |
| Elias Lervig | V-M | 21 | 8 | 381 |
| Magnus Heinason | V | 18 | 3 | 53 |
| Bárður á Reynatrøð | MV | 18 | 2 | 180 |
| Hjalti Strømsten | V | 21 | 2 | 39 |
| Tonni Thomsen | M-Á | 19 | 2 | 32 |
| Túri Géza Tamas | MV | 44 | 1 | 90 |
| Pól Enok Hansen | V | 20 | 1 | 7 |
| Arnbjørn Svensson | M | 18 | 1 | 5 |
| Magnus Jarnskor | M | 22 | 0 | 0 |

Venjari: Sigfríður Clementsen

| | D | MM | S |
|---|---|---|---|
| HB | 14 | 18 | 37 |
| KÍ | 14 | 16 | 32 |
| NSÍ | 14 | 17 | 26 |
| B36 | 14 | 9 | 25 |
| Víkingur | 14 | 4 | 23 |
| EB/Streymur | 14 | 0 | 17 |
| Skála | 14 | -6 | 17 |
| TB/FCS/Royn | 14 | -12 | 11 |
| AB | 14 | -21 | 8 |
| 07 Vestur | 14 | -25 | 4 |







pf. **FOSSÁ**
**og HÝSISÁ**

*Tlf. 332691 - Fartlf. 212526 - Fax 333691*
*FO-360 Sandavágur*



# Kvinnurnar tevja gull

*Jarnhold Nattestad*

**Hóast lítillátin mál fyri úrslit, hava kvinnurnar verið náðileysar áðrenn summarsteðgin. A-liðið hevur tikið 28 av 30 møguligum stigum, 9 sigrar og 1 javnleik hesar 10 dystirnar higartil. Í løtuni liggja tær altso 10 stig frammanfyri nærmasta avbjóðaran, TB/FC Suðuroy/ Royn. Tó liggja AB/B71 bert 1 stig aftanfyri suðringar, men við tveimum dystum til góðar, mótvegis teimum og okkum.**

Eisini B-liðið hevur klára seg væl og hava gjørt stór framstig. Fleiri yngri leikarar hava eisini fingið møguleikan og mikukvøldið móti ÍF/Víkingi, vóru, fyri fyrstu ferð, heili 3 U15-leikarar á vøllinum. Stigini eru tó ikkiso nógv, men, sum sagt, er talan um leikarar og lið í stórari menning.

Á kvinnuliðum okkara, nú 10 umfør eru leikt, hava 33 leikarar verið á vøllinum í svarta búnanum. Nakrar hava leikt nakrar fáar dystin, tríggjar bara 1, men umleið 20 hava spælt nærum allar dystirnar. Við fáum hagtølum í 2. deild er ilt at gita um toppskjúttar, men okkara er Margit M. Kwao úr Miðvági, við 11 málum í 10 dystum. Hon mann nokk eisini verða toppskjútti í deildini, men tað vita vit ikki fyri vist.

Eftir dystirnar hetta vikuskiftið verður farið í summarfríð. Kvinnurnar hava tá leikt 11 av 14 dystum, so kappingin er komin rættiliga væl áleiðis. Fyrireikingarnar til næsta ár fara eisini skjótt í gongd, men greitt er longu, at eitt av høvuðsmálum okkara verður at fáa eitt U18-lið upp at standa.

Nógvir leikarar, av teimum, sum hava leikt í ár, hava aldur til U18 næsta ár, sum er fyri leikarar føddir í 2001-2004. Og á U15-liði okkara, eru rættiliga nógvir leikarar, sum flyta upp til komandi ár. Vónandi verður tikið væl ímóti hesum, sum er avgerandi fyri framtíðina í kvinnudeildini hjá 07 Vestur.

Koyrið á, 07 Vestur!

Klædnahandilin
SORELLA
Miðvágur

# LEIKARALISTI - kvinnur 07 VESTUR

Anna Gaardlykke
Annika Dam
Annika Niclasen
Barbara Prior
Birna Henriksen
Bjørk Dalsgaard
Emily Helgadóttir
Eyðvør Tórbjørnsdóttir Poulsen
Helena Jørgensen
Helga Hansen
Henrikka Wang Jacobsen
Joan Hovgaard
Joan Johnsdóttir Kruse
Jona Joensen
Jonnhild Thomassen
Jónvør Nysted
Julia Niclasen
Karin á Steig
Katrin Antonia Fjallsbak
Katrina Davidsen
Lydia Eyð Berg
Margit M. Kwao
Margreta L. Olsen
Marianna Petersen
Mona Sunnuvudóttir Poulsen
Ninna Olsen
Palma Kristiansdóttir
Paula Jensen
Petra Ingebrigtsen Kruse
Rannvá Briansdóttir
Rannvá Kambskarð
Rebekka Egilstoft Hentze
Rósa Maria Gardar
Rutt Magnusdóttir
Sesilia Olsen
Sesilia Prior
Sissal Haraldsen
Súsanna Fríða Andriasardóttir
Súsanna Smith Johansen
Tomasia Niclasen

Høvuðsvenjari:
Alexandre da Silva Braga
Hjálparvenjari:
Joan Hovgaard
Málmansvenjari:
Birgir Joensen

| Navn | dystir | mál | gult | reytt |
|---|---|---|---|---|
| Sesilia Prior | 11 | 1 | 1 | 0 |
| Margit M. Kwao | 10 | 11 | 0 | 0 |
| Sissal Haraldsen | 10 | 8 | 0 | 0 |
| Barbara Prior | 10 | 2 | 0 | 0 |
| Rebekka E. Hentze | 10 | 0 | 0 | 0 |
| Julia Niclasen | 9 | 5 | 0 | 0 |
| Annika Niclasen | 9 | 3 | 0 | 0 |
| Bjørk Dalsgaard | 9 | 2 | 2 | 0 |
| Anna Gaardlykke | 9 | 0 | 0 | 0 |
| Helena Jørgensen | 9 | 0 | 0 | 0 |
| Herborg Gaardlykke | 9 | 0 | 0 | 0 |
| Tomasia Niclasen | 9 | 0 | 0 | 0 |
| Henrikka W. Jacobsen | 8 | 3 | 0 | 0 |
| Sesilia Olsen | 8 | 2 | 0 | 0 |
| Birna Henriksen | 8 | 0 | 0 | 0 |
| Mona S. Poulsen | 7 | 6 | 0 | 0 |
| Jana Jacobsen | 7 | 3 | 0 | 0 |
| Paula Jensen | 7 | 1 | 0 | 0 |
| Katrin A. Fjallsbak | 7 | 0 | 0 | 0 |
| Marianna Petersen | 7 | 0 | 0 | 0 |
| Súsanna Smith Johansen | 7 | 0 | 0 | 0 |
| Annika Dam | 6 | 0 | 0 | 0 |
| Joan Hovgaard | 6 | 0 | 0 | 0 |
| Katrina Davidsen | 6 | 0 | 0 | 0 |
| Rutt Magnusdóttir | 6 | 0 | 0 | 0 |
| Kristianna á Lofti Haraldsen | 5 | 0 | 0 | 0 |
| Sunrið E. Nielsen | 5 | 0 | 0 | 0 |
| Karin á Steig | 4 | 0 | 0 | 0 |
| Barbara H. Poulsen | 3 | 0 | 0 | 0 |
| Sólja F. Gudmundsen | 3 | 0 | 0 | 0 |
| Eyðvør T. Poulsen | 1 | 0 | 0 | 0 |
| Hanna Thomassen | 1 | 0 | 0 | 0 |
| Miriam Thomassen | 1 | 0 | 0 | 0 |

**Tabell, kvinnur**

| Lið | D | +/- | Stig |
|---|---|---|---|
| 07 Vestur a | 10 | 32 | 28 |
| TB/FCS/Royn | 10 | 13 | 18 |
| AB/B71 | 8 | 13 | 17 |
| ÍF/Víkingur | 9 | 6 | 12 |
| AB | 9 | -10 | 11 |
| 07 Vestur b | 10 | -18 | 8 |
| EBS/Skála (-3) | 7 | -2 | 4 |
| Giza Hoyvík | 9 | -34 | 1 |

**Toppskjúttar, kvinnur**

| | |
|---|---|
| Margit M. Kwao | 11 |
| Sissal Haraldsen | 8 |
| Mona S. Poulsen | 6 |
| Julia Niclasen | 5 |
| Annika Niclasen | 3 |
| Henrikka W. Jacobsen | 3 |
| Jana Jacobsen | 3 |
| Barbara Prior | 2 |
| Bjørk Á. Dalsgaard | 2 |
| Sesilia Olsen | 2 |
| Paula Jensen | 1 |
| Sesilia Prior | 1 |

SPEKT
løggildir grannskoðarar

Staravegur 17
Postsmoga 3258
110 Tórshavn

Telefon 34 34 34
spekt@spekt.fo
www.spekt.fo




unicar.fo
FAIR CAR RENTAL - +298 544 000
BILAR TIL SØLU Á UNICAR.FO

CARRO
carro.fo - 21 25 51




FST
Fyns Smedejerns Trapper A/S




©JN.FO


MEST
©JN.FO


MEST
©JN.FO


14


VISTFRØÐI Í KASSA
Tú kanst bíleggja ein kassa av frukt, ein kassa av grønmeti ella ein kassa av frukt og grønmeti.
Les meira um prís og annað á heimasíðu okkara, www.fk.fo, ella fá meira at vita í einum av FK handlunum kring landið.
fk
Føroya Keypssamtøka


Hølcksmíð
v/Gerhard Hansen
Alt innan timburarbeiði
Tlf. 282710


Neinbjørn Nattestad
Bilverkstaður
Tlf. 332727 | Fax. 333727


MÚRARIN
V/ Kell E. Jensen
Kálvalíðvegur 10
370 Miðvág
tlf. 332779 og 222101
t-post: murarin@olivant.fo

Sportigan

ÍTRÓTTUR. ALT ÁRIÐ.

KEYP EISINI OKKARA VØRUR
Á FØROYA FEITASTA NETHANDLI

WWW.SKALKUR.FO

ÓKEYPIS TIL DYRNAR
Í ØLLUM FØROYUM.

| SMS 31 95 12 | SALTANGARÁ 45 95 12 |

# Fótbóltshjún

*Eyðun Jacobsen*

Er tað eitt stað har romantikkurin hevur blómað, so er tað í bestu fótbóltsdeildini. Liðnøvnini gerast alsamt longri, so hvørt sum bygdir, býlingar og gøtur leggja síni fótbóltsfeløg saman. Skal ein halda við Sandvík,Royn,TB,FC-Suðuroy,Porkerisbóltur krevst at hava góðar kjálkavøddar. Tað tekur tað mesta av einum hálvleiki at rópa liðnavni einaferð og tá hevur mótstøðuliðið nokk bæði skorað tvær ferðir og fingið sær eitt gult kort. Stakkals manning á Rás2 sum trúliga varpar út hvønn dyst. Vænti tey biða til, at EB/Streymur ikki fer at fríggja til Vestmanna og Kvívík, tí so verður tað hart tá samanlagda liðið úr Norðstreymoy og Vestureysturoy skal hitta samanløgdu liðini úr norðaru og sunnaru helvt av Suðri.

Tá er meira stílur yvir dagsins fótbólts-hjúnum, tey hava brúkt rættin at fáa sær eitt nýtt navn, eitt navn sum situr væl og har tað ber væl til hjá lokalu bygda-skøldunum at yrkja sangir til ársveitsluna. Nullsjey vestur, málmaðurin er bestur kann man altíð byrja við, og so syngir man seg fram eftir vøllinum har samanspæli hjá nullsjey ger at verjan hjá hinum kemur í neyð.

Tað góða við at verða hjún er, at man hevur lovað hvørjum øðrum at elska hvønn annan tá tað gongur undan, men ikki minst skal kærleikin blóma tá tað gongur ímóti. Dagsins lið eru bæði eitt sindur í mótgongd, gestirnir úr Lorvík, Norðragøta, í Gøtugjógv, Syðrugøta, undir Gøtueiði og í Skálafirði hava sveimað á ljósareyðum skíggjum og hava úr at gera at pussa juvelir og steyp. Men gerandisdagurin er komin aftur, uppvaskið skal takast og nú er brádliga vandi fyri at árliga uttanlandsferðin er í vanda. Kortini sæst at kærleikin er sterkastur, felagið letur tey ungu sleppa at royna seg og vísir teimum álit. Sama kærleika skulu vit finna í Mykinesar, Gásadals, Bíggjars, Sørvágs og Sandavágs bóltfelag. Verður tað ongin Europatúrur næsta ár, jamen so má man fara ein túr við Lakeside at eta suppu og tað er ikki vikudagurin man spælir bólt sum hevur týdning, men alt tað sjálvbodna arbeiði sum verður lagt í felagið og við tíðini ger at felagið fer at blóma í nærumhvørvinum og við tíðini fær møguleikan at fara út at buka tær stóru stjørnur.

So drívi á, bæði víkingar og nullsjeyarir.


©JN.FO


MEST
SHIPYARD
©JN.FO

# VIÐLÌKAHALDSFRÌTT











## PLASTKLÆDNING OG BJÀLVING

Vit umboða dygdar húsaklæðningin úr plast.
Týski klæðningurin er sera væl egnaður til føroyska veðurlagið.

10 ymiskir litir eru at velja í,
og horn og listar fáast í somu litum.

Brettini eru heili 6 metur til longdar.

**SANDAVÁGS TIMBURHANDIL**
Hillingatangi - 360 Sandavágur - Tlf. 332700 - www.timbur.fo








#FLÚGVAFYRIFØROYAR

Atlantic Airways Vagar Airport 380 Sørvágur Tel 34 10 00 www.atlantic.fo

ATLANTIC AIRWAYS

BURÐARDYGGUR

HAVBÚNAÐUR



HIDDENFJORD®

Raised in the Wild.



www.hiddenfjord.com • hiddenfjord@hiddenfjord.com • +298 662100